Nr. 35/2020

Beinta Løwe Jacobsen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um teknmálstulkar, settur landsstýrismanninum í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hvussu nógvir teknsmálstulkar eru í starvi í løtuni?
2. Hvussu nógv er talið á tulkum í starvi minkað, og hví?
3. Fáa deyv ta tænastu, ið tey hava rætt til? (t.d. læknaørindi, skúlaørindi, tiltøk í vikuskiftum, tiltøk eftir kl.16 o.s.fr.)
4. Hvat verður gjørt fyri at fáa fleiri teknsmálstulkar?
5. Nær ætlar landsstýrismaðurin, at nóg nógvir teknsmálstulkar aftur eru, so deyv fáa tær tænastur, ið tey hava rætt til?

Viðmerkingar:
At tað ikki eru nóg nógvir teknmálstulkar ávirkar gerandisdagin hjá deyvum. Millum annað ber ikki til hjá deyvum og tunghoyrdum at fáa sær útbúgving, um teknsmálstulkar ikki eru. Teknsmálstulkar eru eisini umráðandi fyri deyv og tunghoyrd, so tey kunnu taka lut í samfelagnum á jøvnum føti við hoyrandi. M.a. stendur kommunuval fyri durum, og eru ongir teknsmálstulkar er trupult, fyri ikki at siga ógjørligt, hjá deyvum at fylgja við í samfelagnum.
Fyri at fáa greiðu á hvør støðan er við teknsmálstulkum verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 30. oktober 2020

Beinta Løwe Jacobsen